# Nýggjur landsliðsvenjari

Badmintonsambandið hevur sett Aritra Nandy úr India sum nýggjan landsliðsvenjara, eftir at Tobias Effersøe er givin í starvinum. Heilt nýggjur er Nandy tó ikki, tí hann var eisini landsliðsvenjari hjá Føroyum árini 2002 til 2004. Sum landsliðsvenjari kemur Aritra Nandy eisini at virka hjá einsøku feløgunum kring landið, har tilgongdin av nýggjum spælarum hevur verið sera stór seinnu árini.



# Grannauppgerð í kvøld

Kvinnuliðini hjá Neistanum og Kyndli spæla í kvøld dyst í Sunset-kappingini. Neistin fekk ikki ta byrjanina upp á kappingarárið, tá tær bláu í evstu løtu bjargaðu sær eitt stig í dystinum móti Tjaldri, og tí er trýst á teimum fyri at vinna dystin. Kyndil spældi sunnudagin móti VB, og tann dystin taptu grønu havnarkvinnurnar greitt.

# yum

## FAKTA

**Navn:** Allan Simonsen
**Aldur:** 55 ár
**Feløg sum spælari:** Vejle, Mønchengladbach, FC Barcelona, Charlton
**Landsdystir fyri Danmark:** 55
**Ársins spælari** í Europa í 1977
**Venjarastørv:** Vejle, Føroyar, Luksemborg
Allan Simonsen býr nú nærindis Barcelona saman við 16 ár yngru konu sínari

- Tá eg tók við, svaraði føroyska landsliðið til donsku 2. deild, men átta ár seinni hevði liðið, tá tað hevði ein góðan dag, kunnu spælt upp í móti fleiri liðum í superliguni.

- Føroyska kappingin var ikki so hørð, men í landsdystunum funnu spælararnir bæði styrki og støði til at fremja góð avrik. Vit spældu upp ímóti fleiri góðum landsliðum. Fingu javnleik ímóti Skotlandi og Slovenia og vunnu á hinum smáu tjóðunum, skrivar Allan Simonsen.

Hann heldur, at umstøðurnar kring føroyska landsliðið vóru sera amatørkendar fyrstu tíðina.

- Fleiri av spælarunum komu ov seint til fyrstu landsliðvenjingina. Summir komu súkklandi og høvdu gloymt gaggurnar eftir ella spældu í nýggju gaggum, so teir fingu bløðrur og ikki kundu venja næstu 8-10 dagarnar.

- Spælararnir komu ov seint til máltíðirnar, og hugburðurin var, at náddu vit tað ikki í dag, so náa vit tað helst í morgin. Eg tosaði við stórum stavum á fyrstu venjingarleguni, og eg noyddist seinni fleiri ferðir at sláa nevan í borðið. Men so við og við góðtóku spælararnir nýggju tíðirnar, og innast inni var tað eisini tað, sum teir allarhelst vildu. Teir vildu jú eisini vinna dystir, og fyri at gera framstig, mást tú vera professionellur, skrivar Allan Simonsen.

### Misti hjartað í Føroyum

Allan Simonsen sigur í bókini, at hann bæði fleiri landsliðsspælarar gevast á landsliðnum, tí hann ætlaði ikki at brúka teir.

- Eg segði við onkrar av teimum, at teir sjálvir skuldu siga við fjølmiðlarnar, at teir góvust á landsliðnum. Um fjølmiðlarnar so ringdu til mín, skuldi eg nokk bakka teir upp. Tað góðtóku spælararnir, og teir fingu møguleikan at gevast á landsliðnum upp á ein góðan máta.

Allan Simonsen hevur bara rósandi orð at bera leiðsluni í Fótbóltssambandinum.

- Vit skaptu framgongd, og tað var fantastiskt sum venjari at uppliva teir broytingar, sum eg og Fótbóltssambandið gjørdu. Onkuntíð hildu teir, at okkurt kostaði ov nógv, og so var eg sinnaður at finna eitt kompromis, men eg var sera væl viðfarin, og teir hildu alt, sum teir lovaðu mær frammanundan. Tað er rættiliga óvanligt í fótbóltsheiminum.

- Sum fólkaslag eru føroyingar sera fyrikomandi, og landið er sera vakurt. Eg misti heilt einfalt mítt hjartað til Føroyar og føroyingar, og tá eg gavst sum venjari, bilti røddin, og fekk tár í eyguni. Tað kvøldið segði eg farvæl til nógvar góðar vinir, og tá Henrik Larsen seinni spurdi meg um føroyska landsliðið, segði eg við hann, at hann fekk heimsins besta arbeiðspláss, skrivar Allan Simonsen.

### Lærdi at vera eyðmjúkur

Tá Allan Simonsen gavst í starvinum sum føroyskur landsliðsvenjari í 2001, var tað millum annað tí, at hann hevði eitt tilboð úr Luksemborg, sum hann hevði hug at taka av. Sum landsliðsvenjari í Luksemborg upplivdi Allan Simonsen tó nakað heilt annað, enn hann hevði gjørt í Føroyum.

- Luksemborg hevði nógv fleiri vøllir enn Føroyar, fíggjarligu umstøðurnar vóru munandi betri, tí landið stuðlaði fótbóltinum við nógvum pengum , og spælararnir vóru eisini væl fyri fíggjarliga. Teir komu til venjing í stórum bilum, meðan føroysku spælararnir stundum súkklaðu til venjing.

- Men nógvir av spælarnir í Luksemborg vóru als ikki so eyðmjúkir sum føroysku spælararnir, og teir í Luksemborg høvdu ikki sama hugburð til lívið og tilveruna. Føroyingarnir høvdu av náttúruni lært, at teir máttu stríðast, men spælararnir í Luksemborg høvdu ikki sama yvirlivingarinstinkt, skrivar Allan Simonsen í bókini.

Allan Simonsen viðurkennir, at tað gekk fram á í Luksemborg, men úrslitini vóru ikki so góð sum í Føroyum.

- Spælararnir og liðið trúðu ikki uppá tað, og í mun til føroyingarnar, so høvdu teir ikki kropsligu styrkina við sær. Meðan føroysku spælararnir arbeiddu gróthart, eisini til venjing, var tað ofta spælt við hæl og tá í Luksemborg, og eg brúkti langa tíð um at finna røttu spælararnar til liðið.

Allan Simonsen gavst í 2004 sum landsliðsvenjari í Luksemborg, eftir at nýggja leiðslan í fótbóltssambandinum har hevði undirgravað hann og royndi at fáa hann frá. Endin var, at Allan Simonsen bæð um ein fund fyri at finna eina semju um at steðga samstarvinum, og tað eydnaðist.

- Menniskjaliga lærdi eg sera nógv av at venja Føroyar og Luksemborg. Í Føroyum sá eg, hvussu eyðmjúkur tú skalt verða her í lívinum, og í Luksemborg lærdi eg, hvussu lítið materiellir lutir og ríkidømi eru verd, um teir menniskjaligu eginleikirnar ikki fylgja við, sigur hann.

Allan Simonsen hevur ikki havt nakað venjarastarv, síðani hann gavst sum landsliðsvenjari í Luksemborg.



*Allan Simonsen saman við Gitte, sum er seinna kona hansara*

*Mynd: Polfoto*

# Eg sveik míni børn

**- Avgerðin um at rýma frá familjuni var sera, sera hørð, og eg kendi veruliga, at eg sveik mínar tríggjar døtur, skrivar Allan Simonsen um hjúnaskilnaðin frá konuni Anette**

ALLAN SIMONSEN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Allan Simonsen fór frá konu sínari, meðan hann var landsliðsvenjari í Føroyum, og hann brúkar nógv pláss í nýggju bókini til at skriva um sambandið við familjuna hjá sær – ikki minst í sambandi við hjúnaskilnaðin og nýggja giftarmálið.

Allan og Anette Simonsen hittust, tá tey vóru 15 ára gomul. Tey hildu saman í 31 ár og høvdu verið gift í 23, tá tey fóru frá hvørjum øðrum í 1998.

- Tað var eitt gott hjúnaband, men við tíðini vuksu vit frá hvørjum øðrum. Og í mínum føri hitti eg ein aðra kvinnu, sum var fitt og dragandi. Anette fann út av tí, og tað var ein sera keðilig tíð fyri okkum øll. Avgerðin um at rýma frá familjuni var sera, sera hørð, og eg kendi veruliga, at eg sveik mínar tríggjar døtur, skrivar Allan Simonsen í nýggju bókini.

- Um eg hevði fylgt heilanum, hevði eg verði verandi hjá familjuni, men skuldi eg fylgja hjartanum, mátti eg rýma.

- Eg kann ikki lata verða við at hugsa, at eg serliga sveik tær báðar yngru døturnar hjá mær, sum vóru 13 og 15 ára gamlar, og eg havi eisini av royndum lært, at tú skalt verða meira saman við tínum børnum og familjuni, enn eg var.

Nýggja kvinnan, sum Allan Simonsen hitti, var Gitte, ið hann nú er giftur við. Hon er 16 ár yngri enn Allan Simonsen, og tey bæði eiga eitt barn saman og búgva í Spania.